

# EB/Streymur trygt víðari

**LØGMANSSTEYPIÐ** EB/Streymur lat ongan iva vera um, at sundalagsmenn hava uppiborið pláss í hálvfinaluni

Uni Holm Johannesen

EB/Streymur hevur vunnið seg eitt fet nærri finaluni í kappingini um Løgmanssteypið.

Sundalagsmenn vóru greitt omaná, tá teir vitjaðu FC Suðuroy seinnapartin í gjár. Úrslitið varð 1-4.

Týdningarmesta løtan var, at Gudmund Nielsen legði gestirnar á odda í fyrsta minuttinum eftir hvíldina.

## Heimaliðið trýsti

Hans Pauli Samuelsen, EB/Streymur, og Jón Krosslá Poulsen, FC Suðuroy, høvdu verið á blettinum í fyrra hálvleiki. Málið hjá Gudmundi Nielsen hevði við sær, at heimaliðið noyddist at spenna álopsbogan og flyta seg nakrar metrar longur fram á vøllin. Suðuroyingarnir vóru fleiri ferðir nær við. Tvær ferðir brast bólturin í stólpan, umframt fleiri spentar støður framman fyri málinum hjá René Tórgarð.

At heimaliðið flutti seg fram á vøllin, gav pláss til gestirnar at fara í skjótálop. Tvær ferðir tók EB/Streymur av, tá Arnbjørn T. Hansen og Leif Niclasen komu á máltalvuna.

Úrslitið sigur ikki alt um dystargongdina. Heimaliðið stríddist væl og prógvaði aftur, at munurin millum uppflytarunum og oddanum í bestu deildini ikki er stórur.

Gestirnir vóru neyvari og tóku av møguleikunum. Men tað er eisini ein stórur eginleiki, sum gjørdi stóran mun.



## BEINA KÓS

*EB/Streymur hevur sett kós móti fjórðu finaluni á rað*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

## Marni boðsendur úr Danmark

Marni Djurhuus var sannførandi í sínum avriki á miðvøllinum hjá EB/Streymi í gjár. Men tað var ikki ætlanin, at fyrrverandi landsliðsleikarin skuldi verða við í hópinum hjá sundalagsmonnum.

Daniel Udsen, Sorin Anghel, Alex José dos Santos, Brian Olsen og Bjarni Jørgensen vóru ikki við. Tí valdi Heðin Askham, venjari, at senda boð eftir Marna Djurhuus, sum hevur verið búsitandi í Danmark síðan ársskiftið.

Marni Djurhuus hevur vant við Vanløse seinastu mánaðirnar, og tað tóktist heldur ikki sum, at tað haltaði við kropsligu venjingini hjá honum.

*uni@sosialurin.fo*